05.1998

## BERT 100 KILO ERU EFTIR AV HEIMSINS TYNGSTA PAPAGEYKI

*"NÁTTARPAPAGEYKURIN", á maoriskum máli Kakapo, stendur nú ovast á listanum yvir teir sera sjáldsomu fuglarnir, sum new zealendingar hava og vilja varðveita.*




Á latíni eitur hesin papageykurin *Strigops habroptilus.* Og tann samlaði stovnurin er sera lítil við bert 54 fuglum tilsamans, ella 100 kilo íalt. Kakapoin er tann tyngsti papageykurin í heiminum við eini miðalvekt á nærum tvey kilo, hóast onkur hendinga steggi kann viga so mikið sum fýra kilo!

Framtíðarvónirnar hjá kakapoanum eru verri, enn ein kann ímynda sær, tí fleiri av fuglunum eru á ellisárum, og einans átta verpingarførar bøgur eru eftir. Haraftrat verpur bøgan bert við fleiri ára millumbili. Hetta merkir so, at fuglurin verður mettur at verða sera hóttur.
Newzealendingar meta kakapoan at verða ein av tjóðarskattum teirra, og tí hava teir sett í verk eina ótrúliga bjargingarætlan.

Um hugt verður at øðrum hóttum fuglum kring heimin, er størsti vansin hjá teimum ofta fyrst og fremst, at hann møguliga verður skotin ella fangaður í ymiskum fellum, har hann fer í vetrarvist, tí hóast fuglurin møguliga er friðaður her á landi og í nánd, er tað als ikki vist, at hann er friðaður aðrastaðni. Í nógvum londum bíða teir eftir flytifuglinum, og meta hann verða ein eins stóran leskibita, sum vit halda lundan vera. Jørð verður turrløgd, so flytifuglurin skal flúgva longri og longri á hvørjum ári, til tess at koma leiðina fram og so framvegis. Henda støðan er tíverri nærum ógjørlig at bøta um!

Heili 10 % av jørðini í New Zealandi er lýst at verða bert til ta villu náttúruna ella "djórareservatir", og fleiri túsund kvadratkilometrar eru av "bush", hvar kakapoin kann leika í, sum hann vil.

**Menniskjað tann størst fíggindin!**
Sum altíð, so er tað av mannaávum, at kakapoin og fleiri aðrir fuglar nú eru at meta meira ella minni avoyddir, hóast hesir fuglar hava funnist í landinum, so leingi nakar minnist. Náttúran í New Zealandi er heilt serstøk, eins og hon ofta er á oyggjabólkum. Flestu planturnar eru upprunaplantur ella endemiskar, og

einastu upprunasúgdjór á landi eru tvær ymiskar flogmýs. Hetta merkir, at fuglanir upprunaliga ikki høvdu nakran fígginda uttan onkran rovfugl, ið fleyg framvið. Hetta elvdi so til, at fuglalívið gjørdist heilt ótrúligt. Eitt nú búðu pingvinir í New Zealandi, ið vóru líka stórar sum ein maður. Haraftrat vóru til 12 sløg av Moa fuglum, sum mest líktust einum strutsi, og sum kundu verða 3-4 metur høgir. Moa'in verður mett at verða størsti fuglur, ið nakrantíð hevur livað.

Gomul søgn frá polynesisku íbúgvunum greiða eisini frá risaørnini, ið vigaði tvær til tríggjar ferðir so nógv sum ein havørn, ella 12 kilo. Henda ørnin leyp á Moa'ina og sambært søgnunum eisini á fólk. Umleið helmingurin av upprunafuglunum er oyddur í New Zealandi seinastu túsund árini. Bara seinastu 140 árini eru 18 fuglasløg oydd, og 60 onnur verða mett at verða sera sjáldsom, ella nærum oydd. So støðan er verri, enn í nøkrum øðrum landi!

**Tá ein ikki kann flúgva!**
Vegna tað at fuglarnir ikki høvdu nakran fígginda, mistu fleiri av teimum førleikan at flúgva, har ímillum trý ymisk sløg av kiwifuglum og so kakapoin. Teir broyttu atburð, og byrjaðu at verpa á jørðini og at leita eftir mati á nátt. Um nú kakapoin følir seg ótryggan, stendur hann pinnastillur og bíðar, til vandin tykist verða av. Á henda hátt kláraði hann seg væl og varp alla staðni í New Zealandi, til fíggindin yvir allar fíggindar vann upp land.

Polynesarir komu til New Zealand fyri umleið túsund árum síðani, og teir veiddu kakapoan til matna. Teir høvdu hundin við sær og so ta polynesisku rottuna. Umleið ár 1800 komu so evropearir, og teir komu við kettuni, ymiskum "márdjórum", rottum og so ikki at gloyma possumin, sum í hesum føri er eitt pungdjór við einum tjúkkum hala. Possumurin hevur tíverri givið kakapoanum og hinum fuglunum mønustingin.

Possumurin stavar frá Australia og er eitt náttardjór. Hann livir av bløðum og ymiskum plantum, men dámar væl at leska sær við einum eggi, einum fuglaunga og ymiskum skordjórum. Australsku planturnar hava langt síðani búnað seg so mikið, at tær kunnu verja seg móti possuminum, so har finst hann bert í avmarkaðari nøgd. Men planturnar í New Zealandi eru ikki vanar við possumin, og hava ikki havt tíð til at búnast til verju, so nøgdin av possumum er vaksin við óhugnaligari ferð. Í dag veit eingin, hvussu nógvir possumar eru í New Zealandi, men mett er, at stovnurin telur meira enn 70.000.000 tilsamans!

Kakapobøgan bæði bølir ungan einsmøll og tekur sær av honum, meðan hann er lítil. Tá hon so leitar eftir føði, verður ungin gloyptur av einum possumi, kettu, rottu ella onkrum øðrum súgdjóri. Kakapoin dugir als ikki at verja seg, tí brúk hevur ongantíð verið fyri verju. Tann nýggi fíggindin er stutt síðan komin, og kakapoin hevur ikki broytt atburð á nakran hátt. Tað tekur eisini nógv, nógv longri tíð.

Sama ger seg galdandi við kiwifuglinum, takahe'ini, sum er ein óvanliga litfagur fuglur, ið mest líkist eini sjógvhønu, og so mongum av fitjufuglunum, ið verpa á jørðini. So ein kann ikki annað enn siga, at sum heild var tað sera býtt at innflyta nakað súgdjór - men lætt er at verða klókur, tá skaðin er hendur!

**Økir uttan súgdjór!**
Newzealendingar hava sett eitt megnartiltak í gongd til tess at bjarga kakapoanum. Fleiri av oyggjunum liggja so langt frá meginlandinum, at hvørki possumurin ella onnur súgdjór megna at svimja hagar. Gift er løgd, har møguleiki er til tað. Skotið hevur verið frá hond, umframt at fellur eru settar upp alla staðni,

til at fanga tey stóru súgdjórini. Og beinanvegin sást munur á fuglalívinum. Áður tyktist fuglurin at royna at lívbjarga sær sum best longst møguligt. Nú tykist vend verða komin í. Fuglurin er róligari, ja ein kann næstan siga, at hvar hann áður tyktist halda andanum, andar hann nú út!

Teir 54 kakapoarnir eru fluttir út á tríggjar av hesum oyggjunum, har eingi súgdjór eru uttan rottan, sum er á tveimum av teimum. Her livir kakapoin undir so náttúrligum umstøðum sum gjørligt. Fólk halda eyga við kakapoan allan sólarringin. Hvør fuglur hevur fingið ein radiosendara festan á seg. Kring hvørt einasta reiður eru ikki minni enn 72 ymiskar fellur settar til at fanga rottur, márdjór, kettur og possumar, skuldu onkur av hesum djórum eydnast at koma til oynna. Haraftrat er videotól sett við hvørt reiður. Fólk sita soleiðis og eygleiða reiðrið alt samdøgrið. Og skuldi ein rotta sníkt seg ov tætt at kakapounganum, meðan bøgan leitar eftir føði, so eru vaktarmenn við byrsu staddir minni enn 100 metrar frá reiðrinum.

**Ógvuliga løgið verpingarlag!**
Kakapoin verpur sum áður sagt bert við fleiri ára millumbili, men verpur ein, ja so verpa allar samstundis. Tað er bert tann unga bøgan sum verpur. Tær vurpu í 1982, 1987, 1991 og í 1997. Hesi fýra árini var samlaða verpingarúrslitið bert 6 ungar tilsamans, fimm steggjar og ein bøga. Roynt hevur verið at geva bøguni eykafóður, so at ungarnir betri skuldu koma undan, men einki tykist at gera mun. Steggjarnir fara annars so høgt upp sum gjørligt og lokka bøguna til ástarleik við at trumma og gneggja so hart, at teir hoyrast í fimm kilometra fjarstøðu. Polynesarir kallaðu hesi "spælistøð" fyri kakapo-havar.

Í New Zealandi vaksa nøkur furulíknandi trø, ið eita "podocarper", sum kakapoin etur. Hetta træ er sermerkt á tann hátt, at tað ber sera nógva frukt tey árini "El Niño" hevur herjað. Sum kunnugt herjaði El Niño eisini í árunum 1982, 1987, 1991 og 1997, og øll hesi árini varp kakapoin. Onkur heldur, at fruktin frá podocarpertrænum hevur nøkur hormon í sær, sum setur verpingina í gongd hjá kakapoanum. Til tess at kanna hetta gjøllari, eru tiltøk sett í verk, har alt, sum kakapoin etur - tað verið seg ber, røtur og frukt, verður kannað á hvørjum ári, fyri at síggja, um nakað hald er í hesum gitingum.

**(Gen) ella ílegubankar, hormonir og ísáðing.**
Umframt alt, ið áður er nevnt í hesi grein, royna newzealendingar seg eisini við nýmótans lívfrøði (bioteknologi) fyri at bjarga kakapoanum.
Sáð frá steggjunum verður savnað, so teir hava møguleika at ísáða bøgurnar, skuldi alt gingið galið. Sáð verður eisini fryst, so at tey ikki nýtast ræðast innannøring (indavl) komandi árini.

Í skrivandi stund verða royndir gjørdar við hønum. Tær fáa tey somu hormonini sum kvinnur fáa, til tess at økja um møguleikan at gerast við barn. Og eydnast hesar royndir við hønunum, hava newzealendingar eisini henda møguleikan at bjarga kakapoanum. Hesar royndir kunnu eisini merkja munin millum oyðing og bjarging av øllum øðrum hóttum fuglum kring heimin, so hetta er ikki sørt spennandi.

Samstundis sum at alt verður gjørt til tess at bjarga kakapoanum, verður alt gjørt fyri at avmarka og helst oyða possumin. Tá møguligt er at økja um burðin, er eisini møguligt at avmarka burðin. Royndir verða gjørdar við andevnum. Tað merkir, at roynt verður at gelda possumin við at geva honum ymisk hormon. Orðatakið sigur, at hvør av øðrum liva má, og hetta tykist possumurin so sanniliga eisini hava lagt sær í geyma, tá hann kom til New Zealand.

Onkur vil kanska siga, at náttúran skal hava frið, men havast má í huga, at tað maður hevur oyðilagt, má maður helst royna at bøta. Possumurin er ikki upprunadjór á New Zealandi, men er komin har við íbúgvunum.

**Allir** fjølmiðlar í New Zealandi fylgja við, og skriva um, hvussu støðan er hjá kakapoanum. Tað er heilt vanligt, at sjónvarpið ber tíðindini um, at nú er tann 10 daga gamli kakapoungin byrjaður at fáa fjaðrar. Newzealendingar vóna, at teir hesa einu ferðina kunnu bøta um skaðan, við at byggja upp aftur ein kakapostovn, sum kann búnast til tað, hann einaferð var!

---

Seinastu árini hevur nógv verið tosað um tjaldrið og lesullina, heiðafuglin, skarvin og so veiðilógina í Føroyum, uttan at nakað verður gjørt. Men, ólíka lættari er tað at tosa, enn at gera nakað.
Her í Føroyum hava vit fugl, sum er minst líka hóttur sum til dømis kakapoin. Men eingin tykist vilja taka nakra ábyrgd á seg, áðrenn tað verður ov seint - og tá fer helst ikki at skorta í við góðum ráðum!

Men um ikki henda greinin vísir, hvussu nógv lættari er tað at verja ein fugl, enn at bjarga honum undan oyðing, ja so skilji eg einki!!

Henda greinin stóð í blaðnum "FUGLE", ið verður útgivið av DOF.

**Týtt M.G.**




Dagføring 01.05.2018: Tá eg skrivaði hesa greinina til Dimmalætting fyri 20 árum síðani, vóru bara 54 kakapoir til. Nú eru teir undir 160 í tali, so sjálvt undir allarbestu umstøðum tekur tað sína tíð at endurreisa ein stovn frá oyðing.

Lesið meira um kakapoin á heimasíðuni http://kakaporecovery.org.nz

Her kunnu tit síggja ein kakaposteggja para seg við nakkan á einum lívfrøðingi :)
https://www.youtube.com/watch?v=9T1vfsHYiKY